Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 28. okt. 2020
Mál nr.: 20/00411
Málsviðgjørt: AP

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg um ferðslu sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við § 46 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 2. ... *nr. I-II. ...* *nr. III, A-C. ...* *nr. III, D.* **Lendisakfar (ATV):** Motordrivið akfar á 4 hjólum ella fleiri við eini eginvekt yvir 190 kg. Motororkan skal vera størri enn 15 kW. Akfarið skal vera útgjørt við last ella viðførisberara.	**1.** § 2, nr. III, litra D verður orðað soleiðis: "**D. Lendisakfar, ATV:** Motordrivið akfar á 4 ella fleiri hjólum, sum í høvuðsheitum er útgjørt sum lendisakfar, og sum kann verða útgjørt við last ella viðførisberara."
Seinna yvirskriftin yvir § 11: "Skráseting av motordrivnum akførum v.m. 5"	**2.** Seinna yvirskriftin yvir § 11 verður orðað soleiðis: "Skráseting av motordrivnum akførum o.a."
Yvirskriftin yvir § 11 a: "Serligar reglur fyri koyring við lendisakfari"	**3.** Yvirskriftin yvir § 11 a verður orðað soleiðis:

	"Serligar reglur fyri lendisakfør"
§ 11 a. Lendisakfar kann bert koyra á ella tvørtur um veg í sambandi við yrkisligan flutning til ella frá ella millum arbeiðsøki, og skal flutningurin tá fara fram á stytst møguligum strekki.	**4.** § 11 a verður orðað soleiðis: "**§ 11 a.** Fyri at kunna skrásetast, skal lendisakfar hava eina eginvekt, sum er yvir 190 kg og eina motororku, sum er størri enn 15 kW. Akfarið skal vera útgjørt við last ella viðførisberara. *Stk. 2.* Lendisakfar kann bert koyra á ella tvørtur um veg í sambandi við yrkisligan flutning til ella frá ella millum arbeiðsøki, og skal flutningurin tá fara fram á stytst møguligum strekki."
§ 11 b. Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um skrokknummar á akførum kann latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til kommunalar tilbúgvingar í Føroyum, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur. *Stk. 2.* Landsstýrismanninum verður heimilað í kunngerð at áseta nærri treytir fyri atgongd til skrásettar upplýsingar, sum verða latnar eftir stk. 1, herundir at lata upplýsingarnar umvegis góðkenda skipan.	**5.** § 11 b verður orðað soleiðis: "**§ 11 b.** Atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni, kann latast hesum almennu myndugleikum: 1) Løgregluni, 2) TAKS, 3) Føroya Landfúta, 4) Umhvørvisstovuni, 5) Føroya Rætti, 6) Endurnýtsluni á Hjalla og IRF, og 7) kommununum. *Stk. 2.* Atgongd til elektroniskar upplýsingar um navn og bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum og tøkniligar upplýsingar um akfør, kunnu latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til tryggingarfeløg í Føroyum. *Stk. 3.* Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um navn og bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum og tøkniligar upplýsingar um akfarið, kunnu latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til feløg og stovnar, sum krevja inn gjald fyri nýtslu av almennum tænastum, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur. *Stk. 4.* Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um navn og bústað hjá eigarum og brúkarum av akførum og tøkniligar upplýsingar um akfør, kunnu latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til peningastovnar í Føroyum í sambandi við tinglýsing av panti í akfarinum í akfarsbókini hjá Umhvørvisstovuni, treytað av, at hvørt akfar sær

	frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur. *Stk. 5.* Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um navn, bústað og telefon nummar hjá eigarum og brúkarum av akførum, sum av ósketni ikki hava rindað fyri brennievnið, kunnu latast til oljufeløg, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur. *Stk. 6.* Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um merki, model skrokknummar og árgang á akførum kann latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til bilasølur, verkstøð og eykalutasølur treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur. *Stk. 7.* Atgongd til elektroniskar stakupplýsingar um tøkniligar upplýsingar á akførum kann latast úr akfarsskránni hjá Akstovuni til tilbúgvingar, treytað av, at hvørt akfar sær frammanundan er eyðmerkt við at upplýsa nummarspjaldur. *Stk. 8.* Upplýsingar fingnar eftir stk. 1-5 mugu ikki latast øðrum privatum uttan so, at hetta er heimilað í lóg. *Stk. 9.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri treytir fyri atgongd til skrásettar upplýsingar, sum verða latnar eftir stk. 1-7, og kann áseta gjald til Akstovuna fyri upplýsingar, sum verða latnar eftir stk. 3-7.”
Seinna yvirskriftin yvir § 15: “Tilvitsávirkandi evni, sjúka, overving m.v.”	**6.** Seinna yvirskriftin yvir § 15 verður orðað soleiðis: “Tilvitsávirkandi evni, sjúka, overving o.a.”
Yvirskriftin yvir § 16: “Rúsdrekkakoyring m.v.”	**7.** Yvirskriftin yvir § 16 verður orðað soleiðis: “Rúsdrekkakoyring o.a.”
Yvirskriftin yvir § 16 a: “Eftirlit m.v.”	**8.** Yvirskriftin yvir § 16 a verður orðað soleiðis: “Eftirlit o.a.”

§ 21. ... *Stk. 1-2.* ... *Stk. 3.* Landsstýrið kann áseta, at koyrikort, sum útgivin eru í Noregi, Íslandi ella í landi, sum er limur í Europeiska Samveldinum, fáa gildi her á landi, eisini eftir, at handhavarin hevur tikið bústað her.	**9.** Í § 21, stk. 3 verður eftir "Íslandi" sett: ", Stóra Bretlandi".
Yvirskriftin yvir § 25: "Neyðsendarkoyring m.v."	**10.** Yvirskriftin yvir § 25 verður orðað soleiðis: "Neyðsendarkoyring o.a."
Yvirskriftin yvir § 27: "Forboð fyri at hanga uppi í akfari og fyri spæli m.v."	**11.** Yvirskriftin yvir § 27 verður orðað soleiðis: "Forboð fyri at hanga uppi í akfari og forboð fyri spæli o.a."
Yvirskriftin yvir § 28: "At seta ella leggja nakað frá sær á vegi m.v."	**12.** Yvirskriftin yvir § 28 verður orðað soleiðis: "At seta ella leggja nakað frá sær á vegi o.a."
Yvirskriftin yvir § 32: "Víkiskylda m.v."	**13.** Yvirskriftin yvir § 32 verður orðað soleiðis: "Víkiskylda o.a."
§ 55 b. Landsstýrismaðurin ásetir treytir um hvussu tryggingarskyldan skal fremjast. Landsstýrismaðurin ásetir samstundis reglur um skyldur hjá tryggingarfeløgum at luttaka í sínámillum skipan um ábyrging í førum, har ábyrgdartryggingarfelag ikki lýkur sína falnu endurgjaldskyldu í samsvari við tær lógaráløgdu ábyrgdartryggingar, sum felagið hevur sett seg fyri. Eisini ásetir hann reglur um skylduna hjá tryggingarfeløgum at veita váttanir fyri endurgjaldskrøvum, ið viðvíkja einum tryggjaðum akfari, ella váttan um, at slík krøv ikki eru sett fram. *Stk. 2.* ...	**14.** Í § 55 b, stk. 1, 1. pkt. verður "ásetir" broytt til: "kann áseta".
§ 55 b. Landsstýrismaðurin ásetir treytir um hvussu tryggingarskyldan skal fremjast. Landsstýrismaðurin ásetir samstundis reglur um skyldur hjá tryggingarfeløgum at luttaka í sínámillum skipan um ábyrging í førum, har	**15.** Í § 55 b, stk. 1, 2. pkt. verður "ásetir samstundis" broytt til: "kann samstundis áseta".

ábyrgdartryggingarfelag ikki lýkur sína falnu endurgjaldskyldu í samsvari við tær lógaráløgdu ábyrgdartryggingar, sum felagið hevur sett seg fyri. Eisini ásetir hann reglur um skylduna hjá tryggingarfeløgum at veita váttanir fyri endurgjaldskrøvum, ið viðvíkja einum tryggjaðum akfari, ella váttan um, at slík krøv ikki eru sett fram. *Stk. 2.* ...	
§ 55 b. Landsstýrismaðurin ásetir treytir um hvussu tryggingarskyldan skal fremjast. Landsstýrismaðurin ásetir samstundis reglur um skyldur hjá tryggingarfeløgum at luttaka í sínámillum skipan um ábyrging í førum, har ábyrgdartryggingarfelag ikki lýkur sína falnu endurgjaldskyldu í samsvari við tær lógaráløgdu ábyrgdartryggingar, sum felagið hevur sett seg fyri. Eisini ásetir hann reglur um skylduna hjá tryggingarfeløgum at veita váttanir fyri endurgjaldskrøvum, ið viðvíkja einum tryggjaðum akfari, ella váttan um, at slík krøv ikki eru sett fram. *Stk. 2.* ...	**16.** Í § 55 b, stk. 1, 3. pkt. verður "ásetir hann" broytt til: "kann landsstýrismaðurin áseta".
Yvirskriftin yvir § 58: "VII Revsing m.v."	**17.** Yvirskriftin yvir § 58 verður orðað soleiðis: "VII Revsing o.a."
§ 58 a. ... *Stk. 2.* Við áseting av sekt fyri brot á § 4, § 16, stk. 5-6, § 17, § 19, stk. 1-3, § 24, stk. 1, § 28, § 29, stk. 1-2, § 29 a, stk. 1-4, § 29 b, § 29 c, stk. 1, §§ 29 d-e, § 30, § 31, §§ 31 a-e, § 32, § 32 a, § 33, § 33 a, §§ 34-35, §§ 35 a-c og §§ 36, stk. 1-3, § 36 b, § 37, stk. 2, § 39, stk. 1-2, § 42, stk. 1 og stk. 6, § 42 a, stk. 1-2, §§ 43-45 og § 45 a, stk. 2-3, verður ásett ein herd sekt. *Stk. 3-12.* ...	**18.** Í § 58 a, stk. 2 verður "§ 16, stk. 5-6" broytt til: "§ 16, stk. 4 og 5".
§ 58 g. ... *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* Mál um rúsdrekka- og promillukoyring, har spurningurin ikki er um hægri revsing enn sekt, og mál, har spurningurin um frádøming av koyrirættinum verður reistur sambært § 59 a, stk. 1, nr. 3 ella 4, kunnu, tá rætturin ikki hevur orsøk til at ivast í, at hin ákærdi er sekur, verða avgreidd við at hin ákærdi í rættinum samtykkir at gjalda eina nærri ásetta sekt og samtykkir	**19.** Í § 58 g, stk. 3 verður "rúsdrekka- og promillukoyring" broytt til: "rúsdrekkakoyring".

treytaða ella treytaleysa frádøming av koyrirættinum í eitt nærri ásett tíðarskeið. *Stk. 4.* ...	
§ 64 a. ... *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá í seinasta lagi gerandisdagin áðrenn ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eyka gjald verða goldið, ið er sama upphædd sum árliga gjaldið fyri tíðarvísa skoðan, sbr. § 64 b, stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt., skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ið er váttað av lækna, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi.	**20.** Í § 64 a, stk. 3, 1. pkt. verður: "gerandisdagin áðrenn" broytt til: "sama dag fyri".
§ 64 b. ... *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá í seinasta lagi gerandisdagin áðrenn ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eyka gjald verða goldið, ið er sama upphædd sum árliga gjaldið, sbr. stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt., skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ið er váttað av lækna, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi.	**21.** Í § 64 b, stk. 3, 1. pkt. verður: "gerandisdagin áðrenn" broytt til: "sama dag fyri".
§ 64 c. ... *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* ... *Stk. 4.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá í seinasta lagi gerandisdagin áðrenn ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eyka gjald verða goldið, ið er sama upphædd sum gjaldið fyri umbidna skoðan, sbr. stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt., skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ið er váttað av lækna, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi.	**22.** Í § 64 c, stk. 4, 1. pkt. verður: "gerandisdagin áðrenn" broytt til: "sama dag fyri".
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nær §§ 3-6 koma í gildi.
	§ 3 § 6 í løgtingslóg nr. 33 frá 26. mars 2002 um fast samband um Leirvíksfjørð verður strikað.

	§ 4 § 8 í løgtingslóg nr. 6 frá 8. februar 2000 um fast samband um Vestmannasund verður strikað.
	§ 5 § 12 í løgtingslóg nr. 30 frá 14. apríl 2014 um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy verður strikað.
	§ 6 Løgtingslóg nr. 48 frá 12. mai 2015 um rætt hjá P/F Vága Floghavn at fáa upplýsingar frá Akstovuni verður sett úr gildi.